# Heilsan frá nevndini fyri eigarafelagið Inni á Gøtu

Desember mánaði er á veg, og jólahugnin breiðir seg.

Um stutta tíð verður jólatræið tendrað og síðan kunnu við gleða okkum til jólini og nýggjárið Inni á Gøtu.

Við hesum lítla faldara vóna vit at geva øllum Inni á Gøtu eitt yvirlit yvir nøkur av teim tiltøkum, sum eru fyri framman.

# Nýtt Opið hús?
# Fundur 21.nov kl 19:30

Opið-hús-tiltakið í býlingshúsunum fyri tey smáu skúlabørnini hevur havt minni undirtøku bæði millum børn og foreldur. Tíðin er helst komin til at broyta tiltakið, og hetta tekur nevndin nú stig til.

Um undirtøka er millum foreldur at vera við kundu vit broytt tiltakið. Kanska skipa fyri biografi okkurt kvøld, borðtenniskapping ella okkurt heilt annað.

Fundur verður í býlingshúsunum 21.nov kl 19:30 um, hvussu vit kunnu umskipa opið-hús-tiltakið.

Hevur tú góð hugskot ert tú vælkomin at senda teldupost til: nevnd@inniagotu.org

# Jólini Inni á Gøtu

Jólatræið Inni á Gøtu verður sett upp og tendrað fyrst í desember.

Tann 24. desember fyrrapart vitja jólamenn við jólapakkum børnini í Ovarugøtu og Niðarugøtu.



# Nýggjárshald

30. des kl 19: Komið niðan í býlingshúsið og gerið okkara egnu faklar til faklagonguna nýggjársaftan.

31.des kl 12: Vit seta upp bál og gera klárt til nýggjárið. Gott um fleiri hava hug at hjálpa til. Komið við jólatrøum at leggja í bálið.

31.des kl 22: Faklagonga byrjar við býlingshúsini og endar við nýggjársbálið, har gestarøðari fer at halda nýggjársrøðu.

# Várveitsla

Í februar/mars er ætlanin at skipa fyri veitslu fyri øllum okkum Inni á Gøtu.

Hava tit hug at vera við til at fyrireika veitsluna?

Send ein teldupost til: nevnd@inniagotu.org.

# Hvat hendir Inni á Gøtu

**Heimasíða:**
www.inniagotu.org

**Facebook:**
Eigarafelagið inni á Gøtu

**Teldupostur:**
nevnd@inniagotu.org

**Lána borð/stólar og steintoy frá eigarafelagnum:**
http://www.inniagotu.org/?page_id=99

**Brot úr kalendaranum í 2019**

- Kanska nýtt Opið hús í býlingshúsinum
- Tunnusláing á føstulávint
- Várveitsla í februar/mars
- Aðalfundur
- Ruddingardagur í mai
- Útferð við eigarafelagnum

***Fylgið við á heimasíðu og facebook ☺***

# Jól og nýggjár og grannatiltøk Inni á Gøtu



# 2018 - 2019